## Elin Josefina Smith framsýning

Í gjár lat Kildegårdens Kunstforening í Skanderborg upp framsýning í hølunum á Kildegården við føroysku listarkvinnuni Elini Josefinu Smith. Framsýningin í Kildegården, ið liggur við Skanderborg í Jútlandi hongur uppi í juli og august. Elin er upprunaliga úr Sandavági, men býr nú í einum lítlari bygd í Jútlandi. Hon hevði sína fyrstu sýning í 1985. Hetta var tvey ár áðrenn hon byrjaði á sniðgevingarskúlanum, Margrete Skolen í Keypmannahavn. Elin hevur gingið átta ár á kvødlskúla og lært seg til Croquise tegning, keramik og grafik. I 1997 gekk Elin á listaháskúlanum í Holbæk. Og í 1998 fór hon á myndaskúlan í Keypmannahavn. Til ber at síggja dømi um listina hjá Elni á sitecenter.dk/ejs. Í heyst hevur Elin fleiri sýningar á skránni.

## Google fær atfinningar

Hóast risa heimasíðan Google er sera hent hjá flest øllum fólkum, eru ikki bert góð orð at bera síðuni. Tað vil ið hvussu er eitt fyrrverandi starvsfólk hjá Google vera við, sum nú gevur av álvara gevur fyrrverandi arbeiðsgevara sínum okkurt at tyggja uppá. Hann letur fortelja, at hóast arbeiðsdagurin er frá kl.10-18 hvønn dag, er lítið og einki at gera. Hinvegin letur fyritøkan fleiri sita hartarbeiðandi við hús. Eisini lýsir maðurin ringu umstøðurnar á arbeiðsplássinum. Tann nú fyrrverandi Google-arbeiðarin starvast nú hjá Microsoft.

# ...tey sum eru í hinum partinum líka sum øll hini...

**Í hesum døgum bjóðar Tjóðpallur Føroya føroyingum upp í ein buss, har sjónleikurin »Náttin áðrenn skógin« verður spældur. Hugskotið er genialt. Hvar eru vit meira saman uttan at tosa við hvønn annan enn í einum bussi? Og hvat gera vit, tá ein ørur maður brýtur allar óskrivaðar lógir og fer at rópa í bussinum?**

UMMÆLI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Bárður Persson kemur sera væl frá einmansleikinum, hann spælir í hesum døgum. Leikurin fer fram í einum býbussi, sum koyrir runt í Havnini*

*Mynd: Sunva Lassen*

Vit kenna øll støðuna. Vit sita í bussinum. Vilja kanska helst sita í frið og náðum. Men so kemur onkur, sum byrjar at práta. Sigur sína meining um, hvussu ótrúliga langt úti tað heila er. Hví eingin ger okkurt við tað. Politikararnir um ikki annað. Ella onkur annar. Bara onkur...

Í hesum døgum spælir Bárður Persson sjónleikin »Náttin áðrenn skógin«. Og lat tað vera sagt beinanvegin. Leikurin er ein uppliving!

Tað vildi bæði verið ov torført og hevði oyðilagt eina góða sjónleikaupplivíng, um vit fóru ov nógv út í æsir við sjálvari søgugongdini í hesum ummælinum. Leikurin er nevniliga næstan líka ørligur sum høvuðspersónurin. Orðini floyma úr bæði vitskuni og dulvitskuni á høvuðspersóninum.

Bárður Perssson dugir nevniliga væl at vera hesin ótrúliga strævni, keðiligi og ótiltalandi maðurin, ið er óður inn á so nógv og móður av øllum, og sum ikki stóð so frammarlaga í raðnum, tá fólkaeydna og situatiónsfernemmilsi vórðu býtt út. Høvuðspersónurin finst at øllum, sum eru í parti við hinum, líkasum øll hini, sum hann sjálvur sigur tað.

### Óvæntaðar kulissur og statistar

Hóast »Náttin áðrenn skógin« varð skrivaður longu fyri góðum 30 árum síðani, havi eg latið mær fortalt, at hetta er fyrstu ferð, at hann verður framførdur í einum bussi. Og tað má sigast at vera væl funnið uppá.

Áskoðararnir standa og bíða í Steinatúni, har tey fara upp í ein reyðan býbuss. Og so byrjar ein ferð inn í eitt viðkvæmt sinni, inn í ein fleirdimensionellan sjónleik og inn í eina øðrvísi uppliving av Havnini.

Heitið »tjóðpallur« fær ein nýggjan týdning, tá tey ymsu støðini í høvuðsstaðnum verða brúkt sum umhvørvi ella kulissur, og tað er stuttligt, tá fleiri kendar havnarmyndir, sum neyvan hava verið ætlaðar í handritinum, síggjast gjøgnum bussvindeygað. Ja, fólk høvdu hug at flenna, tá ein kendur handilsmaður sjálvt premiurukvøldið stóð úti á gøtuni og stoypti trappu, meðan bussurin bíðaði eftir grønum ljósi, ella tá ein kendur lesarabrævskribentur og fyrrverandi gøtusópari heilar tvær ferðir rann framvið bussinum og av tilvild bleiv statistur. Men eisini kropsmálið og eygnabráini, sum høvuðsleikarin sendi ymiskum støðum og bygningum í Havnini kundu siga sítt sum tigandi samfelagsviðmerkingar.

Havnin fekk eina nýggja dimensión. Og tað fekk sjónleikurin eisini. Ikki bara hesin sjónleikurin, men sjálv leiklistin, ið Bárður Persson og hansara fólk eksperimentera við í hesum verkinum.

### Stílir og nuansur í málinum

Tað lætta talumálið, ið Bárður Persson sum týðari sjálvur hevur megnað og torað at funnið at skapt í umsetingini, elva fram ein stíl og eitt lag í føroyska málinum, ið sjáldan fær innivist í skriftmálinum ella tí almenna rúminum sum heild. Nuansurnar í tí føroyska málinum, ella teimum føroysku málunum, sum handritið fær fram, ger, at áskoðararnir verða drignir inn í heimin hjá høvuðspersóninum - hesum einsamalla fremmandarbeiðarnum, sum er so einsamallur í tí stóru fjøldini.

Tí sjálvt í kollektivari ferðslu er einsemi og stillstandur.

Tað er syrgiligt. Tað er stórbýarveruleiki. Men tað er eisini stuttligt, frekt og fúlt, tá tað er framført av Bárði Persson og leikstórnað av Hans Tórgarð.

### Fyri øll

Orðið bussur kemur av orðinum omnibus, ið merkir »fyri øll«.

»Náttin eftir skógin« kann erta onkran, men leikurin er fyri øll, tí evnið er alment og menniskjasligt, og leikritið krevur ikki tær stóru tillagingarnar, alt eftir hvar hann verður spældur.

Tí hevði tað kanska verið eitt hugskot, um Tjóðpallurin fór kring landið við hesum leikinum, hóast mentanirnar og farleiðirnar kring okkara lítla oyggjaland kunnu vera ymiskar. Leikurin verður jú spældur í einum bussi. Tó skulu ruturnar hóska til replikkir og handrit annars, og tað er ótrúligt, at leikarin, busssjaufførurin (Óli G. Samuelsen) og leikstjórin hava fingið alt at hóskað saman – tað kann neyvan vera lætt at spæla einmansleik í einum býbussi.

Men sum sagt áttu øll at sæð hendan leikin.

Vit hava jú øll roynt tað. Hendan mannin, ið byrjar at tosa í bussinum, og prikar hol á alt tað, tú ikki væntar, ber til at gera í millum fólk. Spurningurin er, hvat vit gera við hendan mannin. Tí sum hann sjálvur sigur, so eru øll í hinum partinum, líka sum øll hini.

Takk fyri, Bárður Persson.

Tað er kanska eitt stórt orð at brúka, men avrikið er framúrskarandi.